LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 25. februar 2026
J.Nr.: LUM-16- 25/19983-37
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um avgerð hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum um ikki at veita øðrum enn børnum við Down syndrom Karlstad tænastu

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerð hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum um ikki at veita málmenningartilboð eftir Karlstad arbeiðsháttinum til barn klagarans. Ráðið hevði í avgerð sínari víst á, at Karlstad tænastan, sambært avtalu millum ráðið og Sernám, einans varð veitt børnum og ungum við Down syndromi. Ráðið hevði fyri umboðsmanninum greitt frá, at Karlstad tænastan var ein fyribils loysn, men eisini ein royndarverkætlan. Grundað á vantandi lýsing og skjalprógv av royndarverkætlanini hevði umboðsmaðurin ilt við at síggja, at talan skuldi vera um eina royndarverkætlan. Umboðsmaðurin helt tað eisini vera sera ivasamt, um heimild var fyri einari fyribils loysn við Karlstad tænastu til útvaldan sjúklingabólk í sernámsfrøðiligu lóggávuni, og at hendan loysnin ikki samsvaraði við líkaregluna ella meginregluna um sakliga fyrisiting. Umboðsmaðurin gav samanumtikið Barna- og útbúgvingarmálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av hesum máli og heitti á ráðið at umhugsa, hvussu tænastan kann veitast uttan at vera avmarkað til ávísa sjúkuavgerð. Umboðsmaðurin heitti eisini á ráðið um at endurskoða heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Sernámi og kanna møguleikan fyri einari meginlóg.*

## 2. Klagan

Við skrivi, dagfest 8. juli 2025, sendu A umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> Vit skulu hervið klaga um viðfestu avgerð hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.
>
> Vit meta framvegis at tað er eitt brot á líkheitsprincippi at tilboðið um Karlstad verður veitt til ein ávísan diagnosubólk, og ikki er grunda á eina tørvsmetan. Hartil vilja vit gera vart við at tann hjálp til málmenning sum B fær frá Sernám, fáa børnini við Down Syndrom eisini. Tey fáa Karlstad afturat hesari hjálpini, sum eina "eyka tænastu". Út frá okkara samskifti við hesi foreldur er tað enntá okkara fatan, at tey enntá fáa fleiri tímar enn B av "vanligu

málmenningini", ikki orsaka av at tey hava ein meira umfatandi tørv, men tí at tey hava diagnosuna Down Syndrom.

Hartil vilja vit gera vart við at vit meta ikki, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðgerð klagu okkara á fullgóðan hátt ella grundgevur nøktandi fyri, at avgerðin hjá Sernámi, hvørs grundarlag er ein fyribils avtala millum Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Sernám, er tikin á sakligum grundarlagi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið staðfestir stutt í niðurstøðu síni:

> *"Fyribils avtalan, um at veita børnum og ungum við Down syndrom Karlstad ráðgeving er ikki í stríð við líkaregluna, tí øll børn, ið hava tørv á hjálp til málmenning fáa hjálp, umvegis Sernám.*
> *Í løtuni fevnir hendan fyribils avtalan bert um børn og ung við Down syndrom, og er B tí ikki fevndur av avtaluni. Avtalan fer at vera eftirmett, har støða skal takast til, í hvønn mun hon skal halda fram og møguliga víðkast."*

Barna- og útbúgvingarmálaráðið grundgevir tó ikki fyri, hvat innihaldið í hesi (fyribils) avtalu er, ella hvørja løgfrøðiliga og fíggjarliga heimild avtalan byggir á.

Sum borgari er tað tí sera trupult at meta um, um henda fyribils avtala fyrisitingarliga ger mismun á soni okkara B.

Og eisini skal vísast á, at tað at avtalan bert er "fyribils" broytir ikki løgfrøðiliga við, um avtalan er heimilað ella ei, ella um innihaldið í henni er sakligt ella ei.
..."

Avgerðin hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, dagfest 7. juli 2025, var soljóðandi:

**"Viðvíkjandi klagu tína um at fáa Karlstad hjálp til sonin**

Tann 21. februar 2025 fekk Barna- og útbúgvingarmálaráðið klagu tína. Klaga verður um, at sonurin ikki fær somu hjálp sum onnur børn, við sama tørvi.

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið avgerð um ikki at ganga klagu tínari á møti.**

*Málsgongdin:*

**Tann 21. februar 2025** fekk Barna- og útbúgvingarmálaráðið klagu tína frá Løgtingsins umboðsmanni. Viðfest vóru tvey skriv, eitt frá IAKM og eitt frá frítíðarskúlanum.

Í uppruna teldupostsamskiftinum millum teg og Sernám, lýsir tú B, har tú millum annað vísir á, at hann hevur lítið/einki mál, men at hansara samskifti er tó í rúkandi menning, har tekn og myndir vera nýttar. Hann sigur einkult orð viðhvørt, og gevur ljóð frá sær í heilum.

Starvsfólkini á stovnum hava víst tær á, at B hevði havt stórt gagn av Karlstad tilboðnum. Tvey onnur børn á stovninum, ið hava líknandi tørv á hjálp við teirra samskifti, hava fingið játtað Karlstad tilboðið.

Tí ynskja tit at fáa Karlstad og taluvenjing til B.

Í sama teldupostsamskifti vísir Sernám á, at taluráðgeving til B er ein sjálvfylgja, men at tey í hesum føri ikki fáa bjóða Karlstad.

Tá spurt verður um hví, vísir Sernám á, at Karlstad er ikki beinleiðis eitt tilboð frá teimum, men at tað er ein serlig avtala, gjørd við Barna- og útbúgvingarmálaráðið, og er avtalan bert galdandi fyri børn við Down syndrom.

Tú vísir í hesum sambandi á eina kæru, Kærustovnurin hevur tikið avgerð í, sum tú metir minnir um. Har Kærustovnurin setir spurnartekin við, um tað fyrisitingarliga er rætt, at Almannaverkið í longri tíðarskeið einans veitir tænastur til útvaldar sjúkubólkar, tí hetta kann hava við sær, at munur verður gjørdur á umsøkjarum, einans orsakað av sjúku og tí ikki fáa sína umsókn viðgjørda útfrá støði, tørvi og ynski hjá tí einstaka, og eftir eini sosialfakligari meting og fíggjarliga rásarúminum fyri tænastu hjá myndugleikanum. Slík regla kann hava við sær, at borgarar longu av teirri orsøk, at teir ikki hava eina ávísa sjúku, verða avskornir frá at fáa tænastur frá myndugleikanum og myndugleikin við hesum "setir skøn under regel". Slík viðgerð kann hava við sær, at munur verður gjørdur á borgarum einans grundað á sjúku, og ikki út frá eini ítøkiligari meting av tørvinum hjá tí einstaka borgaranum.

At enda verður tær vegleitt at klaga til Barna- og útbúgvingarmálaráðið, har tú klagar um, at sonurin ikki fær somu hjálp sum onnur børn, við sama tørvið.

**Tann 11. apríl 2025** fekk Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðmerkingar frá Sernám.

Sernám vísti á, at tilboðið um Karlstad ikki beinleiðis var frá teimum, men frá okkum, Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og at tað er galdandi fyri børn við Down syndrom. Sernám vísir á, at talan er um eina serliga avtalu gjørda við Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

Sernám vísir eisini á, at tey hava givið kæruvegleiðing, har víst var á, at kærast kundi til Barna- og útbúgvingarmálaráðið, sbrt. løgtingslóg um fólkaskúlan § 59, stk. 2.

**Tann 23. apríl 2025** fekk Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðmerkingar tínar.

Tú vísir á, at tað er í stríð við líkaregluna í fyrisitingarrætti og forboðið móti mismuni í breksáttmálanum, at veita Karlstad til eina útvalda diagnosu, og ikki at byggja sína avgerð á eina tørvsmeting.

Tú vísir á grein hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum frá 10. juli 2023, har landstýrismaðurin sigur*: "Sum dømi kann nevnast, at tað frameftir fer at verða møguligt hjá øllum avvarðandi hjá børnum og ungum við Down syndromi at fáa Karlstad-ráðgeving. Talan er um eina fyribils loysn, meðan arbeitt verður við at finna eina langsiktaða loysn,*

*sum skal fevna um øll børn og ung við mál- og samskiftistrupulleikum, óansæð tørv og avbjóðing."*

Tú vísir á skrivi frá IAKM og frítíðartilboðnum, ið vísa á, at Karlstad ikki bert er egna til børn við Down syndrom, og at B fær stóran gagn av at fáa Karlstad, sum hann í løtuni fær frá Tórshavnar Kommunu.

At enda heitir tú á okkum um at broyta mannagongd soleiðis, at Karlstad-ráðgeving verður veitt til børn, ið hava tørv á hjálp til samskifti, og ikki bert, tá ið talan er um eina útvalda diagnosu, og at B tí frameftir kann fáa hesa ráðgeving.

<u>*Viðgerð:*</u>
Við heimild í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan § 59, stk. 2, viðgerð Barna- og útbúgvingarmálaráðið hesa klagu.

Í mun til avgerðina hjá Kærustovninum, sum tú vísir á, er tann avgerðin tikin útfrá øðrum fortreytum, við tí at talan er um løgtingslóg nr. 79 frá 2019, har viðmerkingarnar til § 38 vísa á, at lógin er ætlað m.a. persónum, sum eru varandi seinheilaskadd, parkinson, sclerosu, ALS ella giktasjúku, hjartasjúku ella lungnasjúku, mistan kropsligan førleika, vegna skaða og/ella slit, viðføddan heilaskaða, kropsligt og/ella kognitivt brek. Harvið hevur Almannaverkið avmarkað sína veitan til nakrar av teimum málbólkunum, sum greinin annars er ætlað til, hóast allir málbólkarnir hava rætt til veitingina. Í fyriliggjandi máli er talan um eina royndarverkætlan, sum í fyrsta umfari er ætlað børnum og ungum við Down syndrom.

Tú vísir eisini á eina grein hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, har landsstýrismaðurin sigur at børn og ung við Down syndrom fáa bjóða Karlstad ráðgeving, sum eina fyribils loysn. Karlstad ráðgevingin, ið verður veitt umvegis Sernám er nevnliga ein royndarverkætlan, og í løtuni verður hon bert veitt til børn og ung við Down Syndrom. Royndarætlanin fer at vera eftirmett, har støða skal takast til, í hvønn mun ráðgevingin skal halda fram og møguliga víðkast.

Tú vísir á, at veitararnir, sum fáa løn fyri at veita Karlstad, siga at Karlstad er vælegnað. Øll børn hava krav uppá at fáa hjálp til málmenning, men harvið er ikki sagt, at øll børn fáa gagn av somu hjálp. Karlstad ráðgeving er ein háttur av mongum innan málmenning. Sernám veitir hjálp til málmenning grundað á logopedfakliga vitan og á eina tørvsmetan. Øll børn, ið hava tørv á hjálp til málmenning, fáa hesa tænastu umvegis Sernám. Tí meta vit ikki, at hetta er í stríð við líkaregluna.

<u>*Niðurstøða:*</u>

Fyribils avtalan, um at veita børnum og ungum við Down syndrom Karlstad ráðgeving er ikki í stríð við líkaregluna, tí øll børn, ið hava tørv á hjálp til málmenning fáa hjálp, umvegis Sernám.

Í løtuni fevnir hendan fyribils avtalan bert um børn og ung við Down syndrom, og er B tí ikki fevndur av avtaluni. Avtalan fer at vera eftirmett, har støða skal takast til, í hvønn mun hon skal halda fram og møguliga víðkast.

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið avgerð um ikki at ganga klaga tykkara á møti.**

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, og Barna- og útbúgvingarmálaráðið ger ikki meira við málið."

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 9. juli 2025 varð klagan send Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til ummælis. Barna- og útbúgvingarmálaráðið varð biðið um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av hesum máli. Barna- og útbúgvingarmálaráðið varð eisini biðið um at lata umboðsmanninum avrit av øllum skjølum viðvíkjandi málinum umframt skjalayvirlit úr journalskipanini. Harumframt ynskti umboðsmaðurin at síggja lýsingina av royndarverkætlanini viðvíkjandi Karlstad og eisini skjølini í málinum um royndarverkætlanina.

Biðið varð um, at frágreiðingin og skjølini frá ráðnum vórðu umboðsmanninum í hendi innan 1. september 2025.

Tann 28. august 2025 bað Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at fáa longt freistina at svara við einari viku. Umboðsmaðurin játtaði hesari umbøn.

Tann 8. september 2025 sendi Barna- og útbúgvingarmálaráðið skjøl og soljóðandi frágreiðing:

**"Viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 8. juli 2025**

Niðanfyri er, sum Løgtingsins umboðsmaður hevur umbiðið tann 9. juli 2025, frágreiðing um viðgerð av kærumálinum yvir vantandi Karlstad til B, umframt frágreiðing um royndarverkætlanina Karlstad.

Viðfest eru somuleiðis umbidnu skjøl í báðum málunum hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Ráðið vil somuleiðis vísa á svar á skrivligan fyrispurning SS-007/2022, sum liggur á heimasíðu Løgtingsins, umframt tíðindaskriv á heimasíðu okkara, dagfest 10. juli 2023, og samrøðu við landsstýrismannin og táverandi stjóran á Sernámi í KVF, dagfest 1. august 2023.

*Frágreiðing av málinum um klagu yvir vantandi Karlstad til B*
Tíðarlinjan (kronologurin) í málinum framgongur í avgerð okkara tann 7. juli (*sí omanfyri undir **2. Klagan,** mín viðm.*), og verður hon tí ikki neyvari útgreinað her. Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal tó greiða nærri frá viðgerðini av hesum málinum.

Fyrst er at viðmerkja, at viðgerðin í sjálvum sær hevur fylgt ásettum fyrisitingarligum reglum um hoyring av stovninum Sernám og kærara, og hevur ráðið tikið avgerð út frá teimum fyriliggjandi upplýsingum, sum vit mettu vóru nøktandi at taka avgerð út frá.

Tó ásannar Barna- og útbúgvingarmálaráðið, at ráðið í fyriliggjandi máli skuldi havt sent móttøkuváttan og kunning um viðgerð til kærara beinanvegin eftir at kæran var móttikin ávikavist 17. og 21. februar, og harmast ráðið um, at kærarin mátti spyrja til málið 2 ferðir, áðrenn hon fekk svar frá okkum tann 27. mars. Ráðið hevur í telduposti tann 27. mars greitt kærara frá hesum, og átikið sær feilin fyri, at málið ikki varð loftað beinanvegin.

Kærarin førir m.a. fram, at avgerðin um ikki at veita øllum, ið ynskja tað, Karlstad-tænastu er í stríð við eina avgerð hjá Kærustovninum.

Her vil Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísa á grundgeving okkara í avgerðini, har víst verður til, at málið, sum Kærustovnurin viðgjørdi, ikki er heilt meinlíkt fyriliggjandi máli. Avgerðin hjá Kærustovninum var við støði í § 38 ll.nr. 79 frá 2019, og har niðurstøðan hjá Kærustovninum var, at Almannaverkið avmarkaði sína veiting á ein hátt, sum ikki var heilt í samsvari við serligu viðmerkingarnar til § 38.

Ráðið skal vísa á, at berandi lógaráseting fyri virksemið hjá Sernámi, sum er ein landsdekkandi ráðgevingarstovnur, er í fólkaskúlalógini, § 4, stk. 5, har tað stendur, "Sernám veitir skúlum foreldrum og øðrum, ið varða av næminginum í fólkaskúlanum, sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga ráðgeving".

Umframt hetta er virksemið hjá Sernámi eisini nevnt í §§ 4, 5 og 10 í serskúlalógini (ll. nr. 47 frá 6. mai 2016), § 11, stk. 2 í frískúlalógini (ll. nr. 67 frá 4. mai 2022), ll. nr. 47 frá 2016 (serskúlar) umframt kunngerðir við heimild í hesum lógum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað sostatt hvørki í lóg ella kunngerð er sett nøkur avmarking á, hvørja tænastu eitt barn ella ein ungur skal hava, men er virksemið stovnsins at veita dagstovnum, skúlum og foreldrum ráðgeving innan sernámsfrøðilig viðurskifti.

Tí skulu øll børn og ung, har tørvur er á tí, fáa neyðuga hjálp umvegis Sernám, og er hetta eisini galdandi í dag, hóast øll ikki fáa júst Karlstad. Her er umráðandi at minnast til, at Karlstad er at síggja sum ***eitt*** amboð av mongum, hvat mál- og samskiftismenning viðvíkur. Sernám hevur í dag 9 taluráðgevarar, sum arbeiða við málmenning burturav, og arbeiða hesir við nonverbalum og verbalum samskifti, har m.a. ljóðlæra, artikulatión, prosodi, orðfeingi, semantikk, syntaks og málnýtsla innganga. Talan er tí um eina breiða viftu av tænastum, sum Sernám veitir, og er tað rættuliga mong børn og ung, sum fáa hjálp umvegis Sernám, sjá fundarfrásøgn frá 26. august 2025 í mál nr. 21/09915, har talið av børnum / ungum, sum fáa hjálp til málmenning frá Sernámi framgongur.
Einhvør tænasta, sum Sernám veitir, verður veitt út frá einari fakligari meting hjá Sernámi av tí einstaka barninum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal sostatt vísa á, at hóast tað er munur á børnum og ungum og tørvinum hjá teimum, so er ikki talan um mismun á, hvør fær veitt hjálp umvegis Sernám, tí ***øll*** sum ynskja tað, fáa ráðgeving frá Sernám, eisini tá talan er um mál- og samskiftistrupulleikar.
Børn og ung hava tí javnbjóðis rætt til hjálp frá Sernámi, og er tað Sernám, sum í hvørjum einstøkum føri ger eina fakliga meting av tørvinum.

*Fyribils skipanin við Karlstad*
Kærarin viðmerkir, at trupult er at meta um, í hvønn mun serskipanin við Karlstad- tænastuni ger mismun.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal í hesum sambandi kunna um, at núverandi skipan við Karlstadtænastuni varð sett í gongd í 2023. Her var og er talan um eina fyribils skipan, sum ráðið nú er farið undir at eftirmeta.
Ráðið skal her royna at lýsa tilgongdina stutt.

Í 2023 heitti foreldur at børnum við einari ávísari diagnosu um at fáa veitt eina ítøkiliga tænastu, Karlstad, sum Sernám ikki veitti. Nógv samskifti var millum partarnar um hetta, t.v.s. bæði IAKM, foreldur, Sernám og Barna- og útbúgvingarmálaráðið tóku lut í tilgongdini, sjá m.a. fundarfrásagnir í málinum.

Sernám hevur víst á, at teirra royndir og vitan hava víst, at Karlstad tænastan ikki er á sama fakliga støði sum onnur amboð, ið Sernám veitir. Hetta er ein av grundunum til, at Sernám valdi at steðga við at veita hesa tænastu í 2019, og var onnur orsøk tann, at arbeiðshátturin/tænastan skipanarliga er torførur at sameina við Sernámi sum stovn, og eru hetta orsøkir til at Karlstad-tænastan í dag ikki verður veitt beinleiðis frá Sernámi, ...
Hinvegin vóru foreldur, sum ynsktu júst hesa tænastu, tí tey mettu hon var góð.

Støðan var sostatt tann, at ávís foreldur mettu, at talan var um eitt gott amboð, meðan sernámsfrøðiligi stovnurin hjá landinum var ósamdur í hesum.

Fyri at eftirkanna í hvønn mun talan var ella er um eitt gott amboð, sum kann veitast, varð avgerð tikin um at royna hesa skipan umvegis Sernám, men tó soleiðis, at tað ikki var Sernám, sum veitti sjálva tænastuna. Endamálið hevur verið at eftirkanna, um til ber at skipa eina tænastu við Karlstadtænastu í Føroyum, uttan at hetta skal leggjast til Sernám, tí stovnurin ikki hevur mett Karlstadtænastuna at vera á nøktandi fakligum støði.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur allatíðina verið tilvitað um og hevur opið kunnað um, at talan er um eitt ávíst amboð, sum einans verður veitt einum ávísum bólki av børnum / ungum við ávísari diagnosu í einari fyribils skipan, sjá eitt nú tíðindaskriv á heimasíðu okkara, dagfest 10. juli 2023, men hevur ráðið ikki mett, og metir ráðið framvegis ikki, at talan er um at gera mismun, tí <u>øll</u> børn fáa sum áður sagt tilboð um hjálp, tá talan er um mál- samskiftistrupulleikar.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at tað, at skipanir verða gjørdar fyri ein ávísan hóp, er ikki eitt eindømi, og kunnu vit eitt nú vísa á "Tann góða tilgongdin", sum enn einans fevnir um børn við autismu.

Ráðið skal eisini viðmerkja, at hvat Karlstad tænastuni viðvíkur, so er her talan um eina skipan, sum í stóran mun hevur verið og er tengt at, hvør kann veita hesa tænastu. Tá fyribils skipanin varð settí verk í 2023 vóru tveir føroyskir veitarar umframt ein danskur. Støðan í dag er tíverri tann, at tann eini føroyski veitarin, beint áðrenn summarfrítíðina, hevur valt ikki at halda fram, og er tað tí bert ein føroyskur veitari, og má tænastan tí í enn størri mun keypast úr Danmark. Talið av børnum / ungum undir 18 ár, sum hava Downs syndrom í Føroyum, er 18, harav 12 hava valt at sagt ja til at fáa Karlstad-tænastuna. Í løtuni er óvist, hvussu stóran mun tænastan má keypast úr Danmark, tí óvist er, hvussu nógv foreldur ynskja at halda fram við tænastuni.

Tað, at tænastan má keypast úr Danmark, er ikki besta loysnin, vísandi til, at talan er um tænastu innan menning, sum sostatt verður veitt á donskum til føroyskar brúkarar.

Avtalan við núverandi føroyska veitaran er galdandi fram til juni 2026, og verður arbeitt fram ímóti at hava eina endaliga støðutakan frá ráðnum áðrenn 1. august 2026 um, í hvønn mun henda skipan skal halda áfram, eitt nú um Karlstad-tænastan skal veitast yvirhøvur ella ikki.

Hetta arbeiði er farið í gongd, og hevur ráðið havt fund við taluráðgevarar á Sernámi í juni 2025 fyri at hoyra nærri um teirra arbeiði, eitt nú eisini um munin á teirra amboðum / tænastu og Karlstad-tænastuni. Harnæst hevur ráðið havt fund við føroyska veitaran og Sernám í august.
..."

Við skrivi, dagfest 15. september 2025, vórðu viðmerkingarnar hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 18. september 2025 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"...
**Yvirskipað**
Barna- og útbúgvingarmálaráðið nýtir í frágreiðing síni nógva orku at vísa á, hví klaga okkara eftir teirra tykki er skeiv, í staðin fyri at fylgja legalitetsprinsippinum og grundgeva fyri, hví avgerð teirra er røtt. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur framvegis ikki (ítøkiliga) víst á, hvør løgfrøðiliga og fíggjarliga heimildin fyri Karlstad-tilboðnum er, ella hví avgerð teirra at bert at bjóða Karlstad-tilboðið til børnum/ungum við ávísari diagnosu er saklig. Harumframt er Barna- og útbúgvingarmálaráðið og/ella Sernám ikki konsistent í síni sakleikameting. Í summum førum verður sakleikametining gjørd eftir hvørjum "bólki" ein er í, og í øðrum førum eftir hvønn tørv ein hevur.

**Umsitingin av Karlstad-tilboðnum**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skrivar í frágreiðing síni, at fakkunnleikin á økinum Sernám ikki metti, at Karlstad tænastan var á sama fakliga støði sum onnur amboð sum Sernámi veitti, og tískil valdi Sernám at steðga við at veita hesa tænastu.

Men eftir áheitan frá ymsum leikfólkum (foreldrum), valdi Barna- og útbúgvingarmálaráðið at skúgva teirra egna stovn og fakkunnleikan á økinum til viks, og endurstova hesa tænastu – men nú bert til børn / ung við einari ávísari diagnosu.

Tað at landsstýrismaðurin ynskir, at stovnur undir honum skal bjóða út ávísa skipan er vanliga ikki ein løgfrøðistrupulleiki, givið at landsstýrismaðurin hevur (generella) heimild og fígging til tess.

Tó krevur tað ítøkiliga heimild um tilboðið bert skal bjóðast út til ávís, um ikki kann grundgevast sakliga fyri hesari uppdeiling. Tað er ikki gjørligt at sleppa undan sakleikakravinum, við at kalla tilboðið "royndarskipan" el. til.

Tískil kann tað ikki brúkast sum grundgeving ella umbering, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið "hevur allatíðina verið tilvitað um og hevur opið kunnað um, at talan var um eitt amboð, sum einans verður veitt einum ávísum bólki av børnum / ungum við ávísari diagnosu í einari fyribils skipan".

Tað at børn / ung við somu diagnosu hava sama tørv, vil allarhelst ofta vera støðan, og tískil vil tað vanliga vera ósakligt ikki at veita teimum somu tænastu. Men hetta útilokar ikki, at børn / ung við ymiskum diagnosum kunnu hava júst sama tørv á ávísum økjum.

Tá so er, er tað ósakligt bert at veita børn / ungum við ávísum diagnosum tilboðið, og ikki børn / ungum við øðrum diagnosum, tilboðið, um tørvurin er hin sami óansæð diagnosuna. Og í slíkum førum er heldur ikki sakliga gjørligt, at bjóða hesum børnum/ungu við øðrum diagnosum onnur tilboð í staðin sum "kompensatión".

Sostatt kann diagnosa ikki altíð nýtast sum sakliga grundarlagið at skilja almenn tilboð millum bólkar, hóast hon ivaleyst oftani kann tað.

**Viðvíkjandi støðuni hjá B**
Tað er ikki rætt, tá ið Barna- og útbúgvingarmálaráðið í skrivinum ber fram, at *"Kærarin førir m.a. fram, at avgerðin um ikki at veita øllum, ið ynskja tað, Karlstad-tænastu er í stríð við eina avgerð hjá Kærustovninum."*

Vit meta ikki, at øll ið ynskja eina tænastu skulu fáa hana. Hinvegin meta vit, at Karlstad skal vera eitt tørvsmett tilboð, har ein tørvsmeting verður gjørd í hvørjum einstøkum føri, ið tekur útgangsstøði í, um barnið hevur munandi samskiftistrupulleikar, og kann fáa gagn av Karlstad metoduni, ella ikki.

*(Sí skriv frá IAKM, ið eg sendi við kæruni, har greitt verður frá at Karlstad-metodan er til øll børn við munandi samskiftistrupulleikum, ikki bert børn við Down Syndrom)*

Tær royndir, ið vit hava gjørt okkum við B við Karlstad metoduni umvegis Tórshavnar kommunu, hava víst at hesin arbeiðsháttur riggar serliga væl til B.

Sum dømi kann nevnast at B gavst at tosa, tá ið hann var um fýra ára gamal (umleið 2020), og at málið kom aftur í oktober í 2024, stutt eftir at starvsfólkini byrjaðu at arbeiða eftir Karlstad metoduni, við støði í einari fakligari meting hjá starvsfólkum í kommununi.

Málið og samskifti hansara hevur verið í rúkandi menning síðani, og tí harmar tað okkum almikið, at B nú hevur mist tænastuna, meðan floksfelagar hansara við Down Syndrom, framvegis fáa tilboðið.

Sum nevnt omanfyri hevur Tórshavnar kommuna gjørt eina fakliga meting av tørvinum, tá ið B fekk bjóða hesa tænastu. Hesum velur Sernám at hyggja burtur frá orsaka av, at B ikki hevur "røttu" diagnosuna. Hugt verður hvørki eftir fakligu metingini ella tann stóra gagn, ið B hevur fingið av hesum.

Umframt omanfyri standandi vilja vit gera vart við at tann taluráðgevingin, sum Sernám veitir umframt Karlstad, verður eisini veitt til børn við Down Syndrom, á jøvnum føti við onnur børn. Í hesum førinum hevur Sernám so avgjørt at tað er tørvurin hjá einastaka barninum, sum er avgerðandi fyri tilboðið um skal bjóðast, og ikki diagnosan.

Karlstad tilboðið er sostatt nakað, sum verður veitt "børnum/ungum við ávísari diagnosu" afturat øðrum tilboðum um málmenning.

**Samanumtikið**
Barna- og útbúgvingarmálaráðið og/ella Sernám hevur framvegis ikki megna at grundgivið fyri, hví tað er sakligt at gera skilnaðin millum hvør fær bjóða Karlstad-tænastuna við "børnum/ungum við ávísari diagnosu".

Tann vanliga sakleikametingin í slíkum førum plagar at taka útgangsstøði í tørvi, og ikki í bólki, hóast tað sjálvsagt kann vera yvirlapp.

At talan er um ein fyribilsskipan, og tað at tey sum ikki eru í "rætta" bólkinum fáa bjóðað aðra skipan í staðin, er í hesum førunum óviðkomandi.

Við skrivi, dagfest 23. september 2025, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 8. oktober 2025 sendi Barna- og útbúgvingarmálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**"Viðvíkjandi viðmerkingum frá A.**

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur móttikið viðmerkingarnar frá kærarunum dagfest 18 september.

Kærarin spyr inn til løgfrøðiligu- og fíggjarligu heimildina til royndarætlanina, og sóknast harnæst eftir svar uppá, hví tænastan verður veitt eftir diagnosu, í hesum førunum børn við Down.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vil í hesum sambandi vísa á viðmerkingar okkara frá 8. september, har víst er á lógarheimildirnar innan sernámsfrøðiliga økið, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið varar av, t.e. fólkaskúlalógin v.m., sjá s. 2 í okkara viðmerkingum dagfest 8. september.

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at fíggjarliga heimildin fylgir tí løgfrøðiligu. Tað er sostatt ikki sett eyka peningur av til Karlstad tænastuna, men er hetta nakað sum verður fíggjað umvegis raksturin hjá Sernám.

Viðvíkjandi uppáhaldinum hjá kærara um, at ein tænasta skal veitast eftir tørv, og ikki eftir diagnosu, skulu vit enn einaferð vísa á viðmerkingar okkara t. 8 september, har vit hava víst á, at Karlstad- royndarætlanin, hvat hesum viðvíkur, ikki eitt eindømi, og vístu vit tá á “ Tann góða tilgongdin”, sum eitt annað dømi uppá júst hetta.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, men vilja vit enn einaferð vísa til skriv okkara dagfest t. 8. september.”

Við skrivi, dagfest 9. oktober 2025, vórðu viðmerkingarnar hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 11. oktober 2025 boðaði klagarin frá, at hann ikki hevði fleiri viðmerkingar.

Tann 30. oktober 2025 sendi umboðsmaðurin soljóðandi teldupost til Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kunnaði klagarin samstundis um hetta:

**“Viðv. klagu frá A, dagfest 8. juli 2025**

Í viðmerkingum tykkara til umboðsmannin, dagfestar 8. september 2025 og 7. oktober 2025, greiða tit frá Karlstad royndarverkætlanini.

Í tíðindaskrivi frá BUMR í 2023 verður víst til, at talan er um eina fyribils loysn Tænastur til børn við Downs syndrom - Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Umboðsmaðurin fer at biðja Barna- og útbúgvingarmálaráðið:

- At greiða frá nær royndarverkætlanin varð sett í verk og hvat fyri áramál varð sett á royndarverkætlanina.
- Útvega umboðsmanninum viðkomandi skjøl, har tað sæst hvat endamálið við royndarverkætlanini er, hvussu hon er avmarkað í tíð og hvør ætlanin er kring eftirmeting av henni.

...”

Tann 11. november 2025 sendi Barna- og útbúgvingarmálaráðið soljóðandi frágreiðing til spurningarnar frá umboðsmanninum:

> "...
> Til svar upp á spurningin um, nær royndarverkætlanin varð sett í verk, vil Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísa á skriv okkara, sent Løgtingsins umboðsmanni tann 8. septembur 2025, har tað framgongur, at royndarverkætlanin var sett í verk í 2023.
>
> Royndarverkætlanin varð sett í verk eftir ynski frá foreldrum og politiskum vilja. Av tí at ynski var um, at skipanin skuldi koma at virka aftur skjótast gjørligt, var ikki høvi at lýsa og fyrireika verkætlanina í smálutir. Tað varð ikki ásett nakað ítøkiligt áramál til at fremja royndarverkætlanina frá byrjan. Eftirfylgjandi hevur ráðið tikið støðu til, at í seinasta lagi tann 1. august 2026, er royndarverkætlanin endað og endalig støða skal vera tikin um, í hvønn mun Karlstad-tænastan skal veitast ella ikki.
>
> Barna- og útbúgvingarmálaráðið er tilvitað um, at tað ikki er heppið at fara undir eina royndarverkætlan, sum frá byrjan ikki er lýst betur, og har fast áramál er ásett, áðrenn farið verður undir slíka verkætlan, men er og hevur ein av avbjóðingunum verið tann, at henda skipanin er tongd av fáum uttanhýsis veitarunum, og er tað tí talan um eina sera sárbara skipan. Í skrivinum frá 8. septembur 2025 vísir ráðið á, at núverandi avtala við verandi veitarar er galdandi fram til juni 2026.
>
> Viðvíkjandi umbønini um øll viðkomandi skjøl vísa vit somuleiðis til okkara skriv, dagfest 8. septembur 2025, har vit frammanundan hava sent umbidnu skjølini. Saman við hesum teldupostinum geva vit Løgtingsins umboðsmanni yvirlit og atgongd til øll skjølini í málinum."

Tann 24. november 2025 kunnaði umboðsmaðurin um, at farið nú varð undir endaligu viðgerðina av klagumálinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um avgerðina hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, dagfest 7. juli 2025, ið lýst er omanfyri undir punkt **2 Klagan**. Dentur verður lagdur á at viðgera uppgávurnar hjá Sernám, fyrisitingarrættarligu líkaregluna og avgerðina hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum um at veita Karlstad tænastuna.

*Uppgávurnar hjá Sernám*

Eingin meginlóg skipar virksemið hjá Sernámi. Hetta stendur eitt nú í andsøgn við virksemið hjá Almannaverkinum, sum í høvuðsheitum hevur sítt virksemi skipað í einari meginlóg, ið er Almannalógin (løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur).

Sernám sæst sum stovnur á undirkonto 20 til løgtingsfíggjarlógina fyri fíggjarárið 2026, og sernámsfrøðiliga virksemið hjá Sernámi í undirvísingarverkinum verður framt sambært § 4, stk. 5 og 6 og § 26, stk. 1 í fólkaskúlalógini (løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan), sambært kunngerð nr. 127. frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul, sambært kunngerð nr. 24 frá 19. mars 2019 um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð og sambært serskúlalógini (løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla).

Í víðari viðgerðini niðanfyri verður hetta nevnt undir einum, sernámsfrøðiliga lóggávan.

Í løgtingsfíggjarlógini sæst eisini at lesa, at arbeiðið hjá Sernámi fevnir um at:

- Skipa fyri og ráðgeva í øllum sernámsfrøðiligum spurningum
- Ráðgeva í sambandi við serundirvísing og sernámsfrøðiligan stuðul
- Kanna, eygleiða og veita ráðgeving í sernámsfrøðiligum høpi, soleiðis at børn og ung við serligum tørvi fáa best møguligar umstøður at læra og mennast í dagstovni og skúlum

Í mun til hetta klagumálið er viðkomandi at hyggja nærri at, hvørjar uppgávur Sernám veitir sambært dagstovnalógini (løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt), ið eisini fevnir um frítíðarskúlar, og sambært serskúlalógini (løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla).

§ 5 í dagstovnalógini ásetir m.a. at børn við serligum tørvi hava rætt til dagstovnapláss og námsfrøðiligt tilboð á jøvnum føti við onnur. § 5 var sett í dagstovnalógina við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005 um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt. Í lógini verður ábyrgdin hjá kommununi at taka sær av børnum við serligum tørvi ásett. Sambært almennu viðmerkingunum til hesa lóg, tekur Sernámsdepilin, ið nú er Sernám, einans støðu til ivamál, hvørt eitt barn er fevnt av dagstovnalógini ella aðrari lóggávu.

Ongin onnur áseting er í dagstovnalógini, ið viðger støðuna hjá børnum við serligum tørvi í dagstovnum v.m., sbr. § 3, stk. 1, undir hesum veiting av sernámsfrøðiligum stuðli. Uppgávurnar, ið Sernám veitir, sambært dagstovnalógini, eru ikki nærri útgreinaðar í dagstovnalógini.

Heimild er í § 4, stk. 6 í fólkaskúlalógini fyri at veita sernámsfrøðiligan stuðul til børn, ið enn ikki eru byrjað skúlagongdina:

> **§ 4.** ...
> *Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann veita børnum, ið enn ikki hava byrjað skúlagongdina, sernámsfrøðiligan stuðul. Somuleiðis verður sernámsfrøðilig ráðgeving veitt foreldrum og øðrum, ið varða av hesum børnum.

Serligu viðmerkingarnar til § 4, stk. 6 eru at finna í løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007 um broyting í fólkaskúlalógini og eru soljóðandi:

> "...
> Hetta er ein víðkað ráðgeving, har foreldur at børnum og onnur, ið varða av børnum í fólkaskúlanum bæði í og undir skúlaaldri, verða tikin við í sambandi við sernámsfrøðiliga ráðgeving, og at næmingar, ið hava tørv á serligari hjálp, fáa serundirvísing ella sernámsfrøðiligan stuðul.
> ..."

§ 4, stk. 6 er heimildin, ið Sernám nýtir í dag fyri at veita stuðul innan dagstovnaøkið.

Í serskúlalógini er eingin beinleiðis heimild fyri, at Sernám kann veita sernámsfrøðiligan stuðul inn á Skúlan á Trøðni.

Heimildirnar hjá Sernámi, sambært serskúlalógini, eru at finna í §§ 4, stk. 2, 5, stk. 3, 6, stk. 3 og 10, stk. 1. Ongar av hesum ásetingum áleggja Sernámi at veita sernámsfrøðiligan stuðul inn á Skúlan á Trøðni.

Hetta stendur í andsøgn við uppgávurnar hjá Sernámi sambært fólkaskúlalógini, ið hava útgreinaða heimild at veita sernámsfrøðiligan stuðul og ráðgeving innan fólkaskúlan.

Í serskúlalógini er ásett í § 6, stk. 2, at Skúlin á Trøðni undirvísir sambært fólkaskúlalógini. Um ásetingarnar í fólkaskúlalógini, um at Sernám veitir næmingum og øðrum sernámsfrøðiligan stuðul og ráðgeving, eisini skulu fevna um Skúlan á Trøðni, er eftir mínum tykki ógreitt.

*Líkareglan og almenna virksemið hjá Sernámi*

Líkareglan er ein grundleggjandi fyrisitingarrættarlig meginregla, ið merkir, at líka viðurskifti skulu handfarast líka. Við øðrum orðum er ikki loyvt myndugleikanum at fremja ósakligan mun.

Í mun til heimildargrundarlagið undir virkseminum hjá Almannaverkinum, er tað mín meting, at talan er um tvey heilt ymisk grundarløg, ið ávikavist Sernám og Almannaverkið virka eftir.

Í Almannalógini er heimild bæði fyri, at Almannaverkið veitir ráðgeving og stuðul, men eisini krav um, at Almannaverkið undir ávísum fortreytum veitir ávísar tænastur og hjálp, t.d § 26 fíggjarligan stuðul til bil, § 27 stuðul til bústaðarbroyting og § 36 um borgarastýrda stuðulstænastu.
Onki krav er í sernámsfrøðiligu lóggávuni um, at Sernám skal veita ávísar tænastur ella ávísa hjálp. Talan er hinvegin í høvuðsheitum um breitt orðaðar ásetingar í sernámsfrøðiligu lóggávuni, ið gevur Sernámi møguleika at gera eina fakliga meting í hvørjum einstøkum føri, ið avgerð, hvørja hjálp Sernám skal veita.

Grundað á heimildargrundarlagið undir virkseminum hjá Sernámi meti eg tí, at tað er alment galdandi, at hóast Sernám ikki veitir somu tænastu ella sama stuðul til øll børn við eitt nú talutrupulleikum, so nýtist hetta ikki at vera brot á líkaregluna, tí Sernám, í mun til Almannaverkið, ikki er álagt at veita ávísar tænastur ella stuðul eftir nærri ásettum treytum. Sernám skal tó í sambandi við sína hjálp og stuðul í øllum førum vísa á ein sakligan tørv í sínari meting av, hvør stuðul er neyðugur og viðkomandi í hvørjum einstøkum føri.

Samanumtikið er tað mín meting, at Sernám á almennum grundarlagi kann taka eina avgerð um, at eitt barn annaðhvørt skal fáa ella ikki skal fáa stuðul sambært Karlstad tænastuni. Í mun til líkaregluna og meginregluna um sakliga fyrisiting er tó neyðugt, at Sernám sakliga og fakliga kann vísa á, hví stuðulin verður veittur ella ikki verður veittur. Ongin heimild er í sernámsfrøðiligu lóggávuni fyri, at ávís sjúkuavgerð (*da. diagnose*) hevur einstakan framíhjárætt til ávísan stuðul frá Sernámi grundað á ítøkiligu sjúkuavgerðina.

Til samanberingar kann vísast til serligu viðmerkingarnar til § 5 í dagstovnalógini, ið vísa, at kommunurnar ikki kunnu geva ávísari sjúkuavgerð framíhjárætt, tá tilboð skulu veitast sambært dagstovnalógini til børn við serligum tørvi:

> “...
> Um mett verður, at barn hevur so serligan tørv, at ikki ber til at integrera barnið á vanligum dagstovni, skal tað fáa annað tilboð sambært forsorgarlógini ella barnaverndarlógini. Talan kann her vera um t.d. fjølbrekað ella serliga atferðartrupul børn. Tá tilboð skal veitast barni við serligum tørvi, skal tilboðið ikki veitast við støði í møguligari diagnosu hjá barninum, men støðið skal veitast út frá tí tørvi, ið júst hetta barnið hevur.
> ...”

*Líkareglan og Karlstad tænastan*
Í almennum tíðindaskrivi frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, dagfest 10. juli 2023, verður fráboðað, at Karlstad-ráðgeving verður veitt øllum børnum og ungum undir 18 ár, ið hava Down syndrom, og at talan er um eina fyribils-loysn.

Fyribils-loysnin er lýst í einari fyribils-avtalu við Sernám, dagfest 6. juli 2023, har m.a. stendur, at Karlstad tænastan verður veitt umvegis Sernám frá øðrum veitarum. Víðari stendur at: *“...Sernám setur seg í samband við foreldur at øllum børnum við Down syndromi undir 18 ár áðrenn 1. september 2023, fyri at vita, um tey ynskja at fáa hesa Karlstad-tænastu. Sernám eftirkannar hereftir einaferð um árið, um avvarðandi ynskja at halda fram við Karlstad-tænastuni...”*.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið lýsti Karlstad tænastuna fyri mær í frágreiðing, dagfest 8. september 2025:

> “...

> Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal í hesum sambandi kunna um, at núverandi skipan við Karlstadtænastuni varð sett í gongd í 2023. Her var og er talan um eina fyribils skipan, sum ráðið nú er farið undir at eftirmeta.
> ..."

Í somu frágreiðing sigur ráðið víðari:

> "...
> Støðan var sostatt tann, at ávís foreldur mettu, at talan var um eitt gott amboð, meðan sernámsfrøðiligi stovnurin hjá landinum var ósamdur í hesum.
>
> Fyri at eftirkanna í hvønn mun talan var ella er um eitt gott amboð, sum kann veitast, varð avgerð tikin um at royna hesa skipan umvegis Sernám, men tó soleiðis, at tað ikki var Sernám, sum veitti sjálva tænastuna. Endamálið hevur verið at eftirkanna, um til ber at skipa eina tænastu við Karlstadtænastu í Føroyum, uttan at hetta skal leggjast til Sernám, tí stovnurin ikki hevur mett Karlstadtænastuna at vera á nøktandi fakligum støði.
> ..."

Í frágreiðingini, dagfest 8. september 2025, og tíðindaskrivinum, dagfest 10. juli 2023, verður Karlstad tænastan nevnd "ein fyribils ætlan" og "fyribils skipan" og í frágreiðing til mín, dagfest 11. november 2025, verður hon nevnd "royndarverkætlanin":

> "...
> Royndarverkætlanin varð sett í verk eftir ynski frá foreldrum og politiskum vilja. Av tí at ynski var um, at skipanin skuldi koma at virka aftur skjótast gjørligt, var ikki høvi at lýsa og fyrireika verkætlanina í smálutir. Tað varð ikki ásett nakað ítøkiligt áramál til at fremja royndarverkætlanina frá byrjan. Eftirfylgjandi hevur ráðið tikið støðu til, at í seinasta lagi tann 1. august 2026, er royndarverkætlanin endað og endalig støða skal vera tikin um, í hvønn mun Karlstad-tænastan skal veitast ella ikki.
> ..."

Í sambandi við frágreiðingina, ið Barna- og útbúgvingarmálaráðið lat mær tann 11. november 2025, bað eg eisini ráðið um at útvega mær viðkomandi skjøl, har tað sæst, hvat endamálið við royndarverkætlanini er, hvussu hon er avmarkað í tíð, og hvør ætlanin er kring eftirmeting av henni.

Ráðið veitti mær ongi skjøl, ið góvu eina betri lýsing av royndarverkætlanini. Ráðið viðurkendi hinvegin at:

> "...
> Barna- og útbúgvingarmálaráðið er tilvitað um, at tað ikki er heppið at fara undir eina royndarverkætlan, sum frá byrjan ikki er lýst betur, og har fast áramál er ásett, áðrenn farið verður undir slíka verkætlan..."

Sum lýst er omanfyri undir yvirskriftini "*Líkareglan og almenna virksemið hjá Sernámi*", hevur Sernám ikki nakra heimild í sernámsfrøðiligu lóggávuni at veita serligum sjúkuavgerðum stuðul einans vegna teirra sjúkuavgerð. Heimildirnar hjá Sernámi í sernámsfrøðiligu lóggávuni eru hinvegin í høvuðsheitum skipaðar sum ein generel heimild hjá Sernámi at veita sernámsfrøðiligan stuðul til børn og næmingar, ið hava tørv á tí.

Soleiðis sum málið er lýst, er onki skjalatilfar í málinum, ið viðger royndarverkætlanina í smálutum. Eg gevi serliga gætur, at onki greitt endamál er lýst, og onki metingarstøði er lýst fyri valið av sjúkuavgerð sum partur av royndarverkætlanini. Harafturat er ongin lýsing av tíðarskeiðnum, ið royndarverkætlanin er avmarkað til, og ongin lýsing av, hvussu eftirmetingin av royndarverkætlanini skal fara fram, t.e. hvat tað er, ið skal eftirmetast, tá verkætlanartíðarskeiðið er lokið, og hvussu tað verður eftirmett.

Grundað á hetta, havi eg samanumtikið ilt við at síggja, at talan skal vera um eina royndarverkætlan, men heldur, at talan er um eina fyribils-ætlan ella skipan, soleiðis sum ráðið sjálvt nevnir, og sum ráðið setti í verk í 2023 og sambært upplýsingum í málinum ætlar at eftirmeta í 2026.

At talan er um eina fyribils-loysn merkir ikki, at fyribils-loysnin er undantikin vanligu fyrisitingarrættarligu meginreglunum, so sum líkaregluni og meginregluni um sakliga fyrisiting.

Fyribils-loysnin veitir ein sernámsfrøðiligan stuðul inn á økið, ið Sernám virkar á sambært sernámsfrøðiligu lóggávuni, og tískil er fyribils-loysnin tengd at heimildargrundarlagnum, ið eitt nú finst í fólkaskúlalógini og dagstovnalógini.

Eg haldi, at heimildargrundarlagið undir fyribils-loysnini er ógreitt, og eg meti tað vera ivasamt um tær ásetingar, ið Sernám virkar eftir innan fólkaskúlaøkið og dagstovnaøkið kunnu rúma einari fyribils-loysn, ið merkir, at einstøk sjúkuavgerð fær serstakan sernámsfrøðiligan stuðul til málmenning framum onnur børn við tørvi á sernámsfrøðiligum stuðli, einans grundað á sjúkuavgerðina, sum í hesum føri er Down Syndrom.

Fyribils-loysnin er tengd at vanligu fyrisitingarrættarligu meginreglunum, og eg haldi tað ikki samsvara við líkaregluna ella meginregluna um sakliga fyrisiting, at onnur børn, ið eisini hava tørv á sernámsfrøðiligum stuðli í sambandi við málmenning, verða frágjørd frá tilboðnum um Karlstad tænastuna einans tí, at tey ikki hava ávísa sjúkuavgerð, grundað á omanfyrinevnda heimildargrundarlag. Av týdningi í hesum føri er eisini, at ráðið ikki hevur veitt mær skjalprógv fyri, at valið av børnum við Down Syndrom og frávalið av øðrum børnum við øðrum sjúkuavgerðum er sakliga grundað.

*Samanumtikið*

Eg viðurkenni, at talan er um eina tænastu, ið avvarðandi siga seg hava stórt gagn av, og at talan er um ein viðbreknan bólk av børnum, ið fáa hesa tænastu.

Vísandi til omanfyristandandi haldi eg tað tó vera atfinningarsamt, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur sett í verk eina fyribils-loysn á henda hátt og latið hana virka á hesum grundarlagi í nærum trý ár, uttan at onnur børn við sama tørvi hava fingið lut í tilboðnum.

Eg fari samanumtikið at geva Barna- og útbúgvingarmálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Eg fari eisini at heita á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um skjótast gjørligt at endurskoða avgerðina um bert at veita ávísan sernámsfrøðiligan stuðul til ein ávísan bólk av børnum við ávísari sjúkuavgerð. Undir hesum, at umhugsa, hvussu tænastan kann veitast uttan at vera avmarkað til ávísa sjúkuavgerð.

Eg fari harafturat at heita á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at endurskoða heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Sernámi. Hugsað verður í hesum sambandi um at kanna møguleikan fyri einari meginlóg, ið skapar eitt greitt heimildargrundarlag fyri øllum virkseminum hjá Sernámi.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður